Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 16. juni 2021

Mál nr.: 21/11633

Eftirkannað: 15.06.21

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at leingja sáttmálarnar millum øðrumegin Føroya Pedagogfelag og hinumegin Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fyri ávís størv undir Almannaverkinum o.a.

§ 1. Henda løgtingslóg er galdandi fyri teir limir í Føroya Pedagogfelag, sum eru í starvi hjá Almannaverkinum og sjálvsognarstovnum undir Almannaverkinum, sum ikki kunnu verða fevndir av arbeiðssteðgi, tí vandi kann vera fyri lívi og heilsu hjá brúkarum og øðrum, um neyðug námsfrøðilig hjálp ikki verður veitt. Arbeiðssteðgur er verkbann, verkfall, blokada og boykott og skipað avfólkan av einhvørjum slagi.
Stk. 2. Tað er Almannaverkið, ið metir um og avger, hvørji starvsfólk Almannaverkið ikki kann vera fyriuttan.
Stk. 3. Viðkomandi limir hjá Føroya Pedagogfelag, sum fáa boð frá Almannaverkinum, hava skyldu til at fara til arbeiðis beinanvegin og at fylgja sáttmálum millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, sum vóru galdandi til 1. oktober 2020.

§ 2. Er Føroya Pedagogfelag ikki samt við avgerðini hjá Almannaverkinum sambært § 1, stk. 2, kann málið verða lagt fyri eina nevnd, sum tekur avgerð um, hvørji starvsfólk hjá Almannaverkinum ella sjálvsognarstovnum undir Almannaverkinum eru undantikin frá møguligum arbeiðssteðgi sambært ásetingum í stk. 5 í avtalu frá 15. januar 2014 um fráboðanarform og fráboðanarfreist millum øðrumegin Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og hinumegin Føroya Pedagogfelag.
Stk. 2. Nevndin verður mannað við 3 limum. Fíggjarmálaráðið velur 1 lim, Føroya Pedagogfelag velur 1 lim, og leiðarin fyri Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu er formaður.
Stk. 3. Nevndin skal taka avgerð innan 24 tímar eftir, at áheitan sambært stk. 1 er komin frá Føroya Pedagogfelag. Verður

nevndin ikki samd, tekur leiðarin fyri Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu avgerð.
Stk. 4. Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag bera útreiðslurnar av samsýning til hvør sín lim í nevndini. Landið ber útreiðslurnar av samsýning til formannin.
Stk. 5. Avgerð sambært stk. 3 kann ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

§ 3. Henda løgtingslóg kemur í gildi, tá ið hon er kunngjørd, og fer úr gildi, tá ið sáttmálar millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, sum koma í staðin fyri sáttmálarnar, sum vóru galdandi til 1. oktober 2020, eru undirskrivaðir.

K**apittul 1. Almennar viðmerkingar**

1.1. Orsakir til uppskotið

Orsøkin til hetta lógaruppskotið er, at Føroya Pedagogfelag, orsakað av miseydnaðum samráðingum um nýggjar sáttmálar við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, hevur lýst verkfall fyri flestu av teirra limum, ið starvast hjá Almannaverkinum og sjálvsognarstovnum undir Almannaverkinum. At so nógvir limir hjá Føroya Pedagogfelag fara í verkfall, kann hava sera álvarsligar avleiðingar fyri lív og heilsu hjá brúkarum hjá Almannaverkinum, ið hava avgerandi tørv á námsfrøðiligari tænastu.

Søguliga gongdin í málinum er í stuttum hendan:

Síðan oktober 2020 hava samráðingar verið millum Føroya Pedagogfelag øðrumegin og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hinumegin um nýggjar sáttmálar. Samráðingarnar hava verið eftir, at Pedagogfelagið tann 18. juni 2020 segði sáttmálarnar upp at fara úr gildi tann 1. oktober 2020.

Tann 10. mai 2021 ynskti Pedagogfelagið, at Semingsstovnurin bleiv boðsendur. Eftir semingsroynd vrakaði Pedagogfelagið semingsuppskot tann 21. mai 2021.

Tann 31. mai 2021 sendi Pedagogfelagið fráboðan til Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um arbeiðssteðg fyri allar limir felagsins, sum starvast í vøggustovunum hjá kommununum. Felagið metti ikki, at tað var neyðugt við undantøkum.

Í fráboðanini stóð, at “arbeiðssteðgurin byrjar 3. juni 2021, kl. 07.00 og endar 4. juni 2021, kl. 07.00.”

Tann 1. juni 2021 sendi Pedagogfelagið nýggja fráboðan til Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um arbeiðssteðg.

Hesaferð var talan um arbeiðssteðg fyri allar limir felagsins, sum starvast í Eind 9 í Almanna-verkinum, leiðslan undantikin. Felagið metti ikki, at neyðugt var við øðrum undantøkum. Arbeiðssteðgurin byrjaði fríggjadagin 4. juni 2021, kl. 07.00 og endaði 5. juni 2021, kl. 07.00.

Fríggjadagin, tann 4. juni 2021, sendi Pedagogfelagið fráboðan til Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um, at Pedagogfelagið aftur setti í verk 24 tíma arbeiðssteðg fyri ávísar limir.

Arbeiðssteðgurin var frá mánadegnum, tann 7. juni, kl. 7.00, til týsdagin, tann 8. juni, kl. 7.00, og var fyri allar limir í Føroya Pedagogfelag, ið starvast innan fólkaskúlan, forskúlar og frískúlar.

Arbeiðsgevararnir mintu felagið á, at setanarviðurskiftini halda uppat, tá ið arbeiðssteðgur er. Starvsfólk, sum eru í arbeiðssteðgi, eru harvið ikki í starvi, meðan arbeiðssteðgur er. Tá ið sáttmálin er farin úr gildi, og samráðingar um nýggjan sáttmála eru endaðar, ber ikki til hjá felagnum at lýsa arbeiðssteðg fyri nøkur starvsfólk í eitt avmarkað tíðarskeið, soleiðis at felagið einsamalt ger av, at hesi byrja aftur í starvi ein ávísan dag, áðrenn partarnir hava gjørt semju um nýggjan sáttmála.

Tá ið Pedagogfelagið sendir limir í arbeiðssteðg er útgangsstøðið, at setanarviðurskiftini hjá hesum fólkum halda uppat, inntil tey byrja í starvi aftur í sambandi við, at semja um nýggjan sáttmála er gjørd, ella onnur avtala er gjørd um, at tey skulu byrja aftur í starvi.

Í hesum sambandi boðaðu arbeiðsgevararnir frá, at um felagið helt fast um 24 tíma verkfallið, fóru Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið at biðja arbeiðsgevararnar um ikki at taka ímóti teimum starvsfólkunum aftur, sum vóru fevnd av verkfallinum, fyrr enn partarnir hava gjørt semju um nýggjan sáttmála, ella onnur avtala er gjørd um, at tey skulu byrja aftur í starvi.

Sum aftursvar uppá verkfallið, ið Pedagogfelagið lýsti tann 4. juni 2021, lýstu Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið verkbann fyri allar námsfrøðingar og hjálparfólk, ið eru limir í Føroya Pedagogfelag, og sum starvast innan fólkaskúlan, forskúlar og í skúlanum á Trøðni, og sum Pedagogfelagið hevði koyrt í verkfall. Hetta við tí fyri eyga at halda seg til tær galdandi spælireglurnar í kollektiva arbeiðsrættinum.

Arbeiðssteðgurin merkti, at nakrir næmingar ikki kundu sleppa í skúla. Fyri at tað skuldi bera til hjá øllum næmingum at fáa eitt skúlatilboð, heitti Uttanríkis- og mentamálaráðið tann 8. juni 2021 á Fíggjarmálaráðið um at loyva, at 48 limir í Føroya Pedagogfelag, sum starvast í fólkaskúlanum og í skúlanum á Trøðni, kundu fara aftur til arbeiðis. Fíggjarmálaráðið gekk umbønini á møti sama dag.

Undirvísingarstýrið heitti tann 9. juni 2021 á Fíggjarmálaráðið um at loyva, at tvey starvsfólk í einum ávísum skúla afturat blivu undantikin verkbanninum. Umbønin bleiv gingin á møti sama dag.

Fríggjadagin 11. juni 2021 boðaði Føroya Pedagogfelag frá verkfalli fyri allar limir felagsins, sum arbeiða eftir sáttmálunum millum Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Pedagogfelag. Grundgevingin fyri hesum stríðsstiginum var, at felagið ikki metir, at arbeiðsgevarin tekur sáttmálasamráðingarnar í álvara. Verkfallið varð sett at byrja mánadagin tann 14. juni 2021.

Viðvíkjandi Almannaverkinum varð boðað frá, at nevndin ítøkiliga hevur mett um tørvin á undantøkum, og vórðu 14 undantøk latin.

Almannaverkið bað tann 12. juni 2021 Føroya Pedagogfelag um undantøk, sum eru grundað á ítøkiligar metingar hjá Almannaverkinum um, hvørjar tænastur eru lívsneyðugar ella, sum av øðrum orsøkum ikki kunnu bíða, uttan at vandi er fyri lív og heilsu ella varandi skaða. Tilsamans varð søkt um 139 undantøk. Pedagogfelagið gekk ikki umbønini á møti, og vildi ikki veita fleiri undantøk enn tey 14, sum vórðu latin; tó kunnu tveir limir átaka sær eina dagvakt og eina náttarvakt á einum staði.

Tey 139 undantøkini, sum søkt varð um, eru ítøkiliga grundað á, hvat skal til fyri at kunna veita ta mest grundleggjandi tænastuna og nøkta grundleggjandi tørvin í gerandisdegnum hjá brúkarunum. Sambært Almannaverkinum er ikki biðið um nakað undantak til námsfrøðiligt menningararbeiði, men bert til minstu forsvarligu normering við atliti at trygd, lívi og heilsu hjá brúkarunum. Í umbønini um undantøk er hædd tikin fyri tænastumonnum, ið kunnu vera til arbeiðis. Víst verður til fylgiskjal 4, ið neyvari lýsir umbønina um undantøk hjá Almannaverkinum.

Almannaverkið metir seg í hesi støðu ikki fáa røkt sína skyldur, og metir somuleiðis lítlan iva vera um, at álvarsamur vandi er fyri lívi og heilsu.

Almannaverkið metir, at tað í roynd og veru er talan um eitt verkfall at kalla uttan undantak, og har Almannaverkið ikki fær ítøkiliga grundgeving fyri noktandi svarinum, og innlit fæst ikki í, á hvørjum fakligum grundarlagi avgerðin verður mett forsvarlig.

Um fleiri undantøk ikki verða givin, kann Almannaverkið ikki tryggja, at arbeiðið kann útinnast trygdarliga ella heilsuliga forsvarligt.

Verkfallið hevur við sær, at Almannaverkið í fleiri førum ikki kann veita ta tænastu, ið Almannaverkið sum minstamark hevur skyldu at veita persónum við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sálarligum trupulleikum.

Avleiðingin er m.a., at á stovnum, har borgarar við fjølbreki, autismu og menningartarni búgva, harav nøkur hava tørv á, at starvsfólk er um tey alt samdøgrið, eru uttan ta minstu manning, ið mett verður forsvarligt.

Hetta er ábyrgdarleyst og má metast at vera í ósamsvari við skyldurnar, sum Almannaverkið hevur mótvegis umrøddu borgarum.

Almannaverkið hevur víst á, at eingin ivi er um, at rættarbrot verður framt móti teimum borgarum, sum hava eitt lógarkrav upp á eina tænastu frá Almannaverkinum. Avleiðingin verður við stórum sannlíkindum álvarsamur vandi fyri lív og heilsu hjá teimum, sum hava størst tørv á stuðli og neyðugari hjálp.

Avleiðingarnar av, at alt ov fá undantøk verða givin, verða m.a., at vandin fyri eitt nú grovum harðskapi ella øðrum ágangi á bústovnum veksur, borgarar við fjølbreki vera í heilsuvanda beinanvegin, borgarar, ið ikki fáa neyðugan heilivág, kunnu blíva psykotiskir og verða til vanda fyri seg sjálvar og onnur umframt fáa álvarslig afturstig, summir borgarar fáa ikki neyðuga hjálp til gerandisdagin, so sum mat, reinføri og heilivág, sum so víðari kann føra til umsorganarsvik, ótryggleika, angist, depressión, lívsvanda og sjálvmorðsvanda. Summir borgarar hava tørv á støðugari hjáveru. Sum dømi kunnu nevnast børn og vaksin við andingartóli, har sjálvt styttri varandi frávera hevur álvarsligan vanda fyri lívi við sær. Notat frá Almannaverkinum um væntaðu avleiðingarnar av verkfallinum er lagt við sum fylgiskjal 4.

Landsstýrið sær ongan annan útveg enn at leggja uppskot fyri Løgtingið við tí endamáli at gera enda á tí partinum av verkfallinum, sum kann hava vanda fyri lívi og heilsu við sær.

1.2. Galdandi lóggáva

Økið er ikki regulerað við lóg, og útgangsstøðið er, at arbeiðsmarknaðarpartarnir, í hesum førinum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, regulera arbeiðs- og lønarviðurskifti í sáttmála sínámillum. Í royndini at gera nýggjan sáttmála hava bæði Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið brúkt sín stríðsrætt. Í einum sáttmálaskeiði hava partarnir friðarskildu, og verður sáttmálin longdur, hava partarnir skyldu at halda seg til treytirnar í sáttmálanum. Hóast tað ikki er vanligt, kann Løgtingið samtykkja eina lóg, sum regulerar treytirnar ímillum partarnar á arbeiðs-marknaðinum. Í Føroyum eru fordømi frá t.d. 1988, løgtingsmál nr. 60/1988, frá 2001, løgtingsmál 56/2000 og frá 2005, løgtingsmál nr. 103/2004.

Í okkara grannalondum hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum gjørt avtalur um skipanir, sum skulu tryggja, at lív og heilsa hjá borgarum ikki eru í váða, tá arbeiðssteðgur er. Partarnir á føroyska arbeiðsmarknaðinum hava ikki gjørt avtalur um slíkar skipanir. Tí síggja vit, at arbeiðssteðgur á ávísum økjum í samfelagnum kann føra til, at lív og heilsa hjá borgarum stendur upp á spæl.

Arbeitt hevur verið við at fáa eina skipan í lag, har tryggjað verður, at borgarar hava neyðuga verju og at neyðug tilbúgving er, tá samráðingar eru á arbeiðsmarknaðinum og verkfall verður lýst.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið heitti tann 1. desember 2020 á formansskapin í Fasta Gerðarrætti um at kanna møguleikarnar at fara undir eina tilgongd, ið skal tryggja, at føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur neyðuga verju ella tilbúgving í sambandi við verkfall.

Formansskapurin tók uppgávuna á seg og hevur havt fundir við bæði arbeiðstakarafeløg og arbeiðsgevarar á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Formansskapurin boðaði á vári 2021 frá, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið hava boðað frá, at tey eru sinnað at fara undir eina tilgongd at gera eina skipan, ið kann tryggja føroyska arbeiðsmarknaðinum neyðuga verju ella tilbúgving í sambandi við arbeiðssteðg.

Hinvegin boðaði Fakfelagssamstarvið t.e. Pedagogfelagið, Lærarafelagið, Sjúkrarøktarfrøðingafelagið, Akademikarafelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag og Starvsfelagið í februar 2021 formansskapinum í Fasta Gerðarrætti frá síni greiðu niðurstøðu: Tey ynskja ikki, at arbeitt verður víðari við málinum.

Formansskapurin í Fasta Gerðarrætti boðaði tí Umhvørvis- og vinnumálaráðnum frá, at meira bleiv ikki gjørt við málið.

Lógaruppskotið, ið nú verður lagt fyri Løgtingið, er greið ábending um, at verandi skipan á arbeiðsmarknaðinum ikki er nøktandi, tí farið verður so harðliga fram, at vandi er fyri lívi og heilsu hjá ávísum borgarum frá fyrsta degi í einum arbeiðssteðgi. Hetta uppskotið fyriheldur seg ítøkiliga til verkfallið, ið Føroya Pedagogfelag hevur sett í verk. Ásannandi, at verkafeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum ikki eru sinnað at gera avtalu um minstu verju av okkara veikastu borgarum, fer landsstýrið í heyst at leggja fram lógaruppskot fyri Løgtingið, sum meira alment fer at tryggja eina mannagongd fyri, hvussu undantøk verða ásett í sambandi við komandi arbeiðssteðgir.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at fyribyrgja, at trygdin fyri lívi og heilsu hjá brúkarum, ið fáa tænastu frá Almannaverkinum, verður sett í váða. Tí verður ásett við lóg, at limir í Føroya Pedagogfelag, sum eru í størvum hjá Almannaverkinum og sjálvsognarstovnum undir Almannaverkinum, ikki kunnu verða fevndir av arbeiðssteðgi, tí frávera frá arbeiðsplássinum kann føra til vanda fyri lívi og heilsu hjá bæði brúkarum og øðrum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Sambært uppskotinum er tað Almannaverkið, ið metir um og avger, hvørji starvsfólk, Almannaverkið ikki kann vera fyriuttan. Teir limir hjá Føroya Pedagogfelag, sum fáa boð frá Almannaverkinum, hava skyldu til at fara til arbeiðis og at fylgja sáttmálum millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, sum vóru galdandi til 1. oktober 2020. Sáttmálarnir eru lagdir við sum fylgiskjal 1 og fylgiskjal 2 til uppskotið.

Um Føroya Pedagogfelag ikki er samt við avgerðini hjá Almannaverkinum um, hvørji starvsfólk Almannaverkið ikki kann verða fyriuttan, kann spurningurin leggjast fyri eina nevnd, sum er mannað við 3 limum, har leiðarin fyri Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu er formaður, og Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag velja hvør sín lim.

Verður nevndin ikki samd, tekur leiðarin fyri Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu endaligu avgerðina í spurninginum. Nevndin skal taka avgerð innan 24 tímar eftir, at áheitan er komin frá Føroya Pedagogfelag um at viðgera málið.

Lógin kemur í gildi, tá ið hon er kunngjørd, og fer úr gildi, tá ið nýggir sáttmálar millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið eru gjørdir.

Hóast tað ikki er vanligt, at politiska skipanin lóggevur í trætumálum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, metir landsstýrismaðurin tað verða neyðugt við politiskari íblanding í verandi sáttmálatrætu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Tó metir landsstýrismaðurin, at inntrivið í samráðingarrættin og stríðsrættin hjá pørtunum verður so varligt sum gjørligt, við bert at lóggeva um ein part av limunum hjá Føroya Pedagogfelag; navnliga bert har tað stendur um lív, og álvarsligur vandi er fyri heilsuni hjá menniskjum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis. Orsøkin til hetta er, at talan er um eitt mál, sum hevur skund, og tí er í hesum førinum vikið frá vanligum mannagongdum viðvíkjandi hoyring av viðkomandi pørtum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ávísar fíggjarligar avleiðingar fyri landið við tað, at landskassin ber útreiðslunar av lønum til teir limir í Føroya Pedagogfelag, sum verða bidnir um at koma til arbeiðis aftur.

Um ein nevnd sambært § 2 verður sett til at taka avgerð kann væntast, at hetta hevur útreiðslur við sær. Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag bera útreiðslurnar av samsýning til hvør sín lim í nevndini. Landið ber útreiðslurnar av samsýning til formannin.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fyrisitingarligar avleiðingar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur avleiðingar fyri teir limirnar í Føroya Pedagogfelag, sum røkja grundleggjandi uppgávur fyri Almannaverkið, og hvørs frávera setur trygd, heilsu og lív hjá brúkarunum hjá Almannaverkinum í vanda. Limirnir skulu, inntil nýggir sáttmálar eru gjørdir millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið, arbeiða undir somu treytum, sum eftir sáttmálanum, sum var í gildi til 1. oktober 2020.

Harafturat hevur lógaruppskotið avleiðingar fyri teir mest útsettu brúkararnar hjá Almannaverkinum. Lógaruppskotið hevur við sær, at hóast limirnir í Føroya Pedagogfelag fara í verkfall, gongur tað ikki útyvir trygd, heilsu og lív hjá brúkarunum hjá Almannaverkinum, tí avgerandi starvsfólkini ikki kunnu fara í verkfall uttan at bróta friðarskylduna.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

ILO konvention 87, Freedom of Association and Protection of the Right to Organise Convention, 1948 (No. 87), er galdandi fyri Føroyar. Hendan konventiónin ásetur ikki ítøkiliga stríðsrættin hjá feløgunum á arbeiðsmarknaðinum, men setur sum fyritreyt, at stríðsrætturin er til, sbrt. art. 3, 8 og 10 í konventiónini. ILO kontrolorganini hava sera stranga praksis um lógarinntriv í stríðsrættin. ILO-organini góðtaka bert inntriv orsakað av serliga umráðandi samfelagsáhugamálum ("essential services"). Tað merkir, at arbeiðsstríðið (her verkfallið) setur lív, heilsu ella persónligu trygdina hjá borgarunum í váða. T.d. hevur organisationsfrihedskomité'in hjá ILO góðtikið lógarinntrivið í sjúkrarøktarfrøðingastríðið í Danmark í 1995, tí sjúkrahúsverkið er mett sum "essential services". (Kelda: Jens Kristiansen, Grundlæggende Arbejdsret, 2. útgáva, Jurist- og Økonomforbundets Forlag 2009, ss. 190-191.

Grundað á omanfyri standandi er hetta lógaruppskotið ikki í ósamsvari við ILO konvention 87.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Evropeiski mannarættindasáttmálin

Evropeiski mannarættindasáttmálin, "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention", varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000. Art. 11, stk. 1 í sáttmálanum verjir rættin til felagsfrælsi (forsamlings- og foreningsfrihed). Hóast dómur frá 6. februar 1976 frá Evropeiska mannarættindadómstólinum (Schmidt og Dahlström-málið) pkt. 34 staðfesti, at art. 11, stk. 1 ikki gevur feløgum sum so serlig rættindi, hevur Dómstólurin í 2008 (Demir and Baykara v. Turkey) staðfest rættin til at samráðast, og í 2009 varð stríðsrætturin staðfestur av Dómstólinum (Yapi-Yol Sen v. Turkey).

Art. 11, stk. 2, í Evropeiska mannarættindasáttmálanum heimilar bert inntriv í felagsfrælsið, undir hesum samráðingarrættin og stríðsrættin, um tað er ásett við lóg, er neyðugt í einum demokratiskum samfelag og strembar eftir einum lógligum endamáli. Lógligu endamálini eru nationala trygdin ella almenni tryggleikin, at forða fyri órógv ella brotsverki, at verja heilsu og siðalag ella at verja rættindi og frælsi hjá øðrum.

Hetta lógaruppskotið er gjørt fyri at verja heilsu og siðalag og fyri at forða fyri harðskapi, sum er brotsverk. Sostatt er lógaruppskotið í samsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan.

Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap. Sáttmálin áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Flestu brúkararnir, sum fáa tænastur frá Almannaverkinum, bera brek, og sostatt er hesin sáttmálin viðkomandi fyri hetta lógaruppskotið.

Sáttmálin áleggur m.a. limalondunum at taka øll hóskandi lóggávu stig til at verja fólk, ið bera brek, bæði innanhýsis og uttanhýsis, fyri einari og hvørjari eyðræning, harðskapi og misnýtslu. Sum tað er greitt frá omanfyri í lógaruppskotinum, verða fleiri brúkarar hjá Almannaverkinum í vanda fyri harðskapi og øðrum ágangi, um neyðugu starvsfólkini ikki eru um tey. Við hesi lógini verður forðað fyri, at hesin vandin kemur í. Sostatt er hetta lógaruppskotið í samsvari við Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ávirkan á verkfalsrættin, men verður mett sum neyðugt inntriv. Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing ella sektir.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið áleggur ikki skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið áleggur ikki gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Sambært § 1, stk. 3 í lógini verður álagt limum í Føroya Pedagogfelag, sum starvast í Almannaverkinum, at fara til arbeiðis, tá tey fáa boð um tað frá Almannaverkinum.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?
Uppskotið heimilar Almannaverkinum at gera av, hvørjir limir í Føroya Pedagogfelag, sum arbeiða hjá Almannaverkinum, skulu vera undantikin frá verkfallinum og arbeiða sambært sáttmálunum millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeðsgevarafelagið, sum vóru galdandi til 1. oktober 2020.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Ja	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í stk. 1 er ásett, hvønn lógin er galdandi fyri. Ásett er, at lógin er galdandi fyri teir limir í Føroya Pedagogfelag, sum eru í starvi hjá Almannaverkinum og sjálvsognarstovnum undir Almannaverkinum, sum ikki kunnu verða fevndir av arbeiðssteðgi, tí vandi kann vera fyri lívi og heilsu hjá brúkarum og øðrum, verður neyðug námsfrøðilig hjálp ikki veitt.

Endamálið við ásetingini er, at Almannaverkið skal kunna veita trygd fyri lívi og heilsu hjá brúkarunum. Hetta merkir ikki, at tænastustøðið ikki verður lækkað, og at gerandisdagurin ikki verður órógvaður. Nær talan kann gerast um vanda fyri lívi og heilsu hjá brúkarunum byggir á eina ítøkiliga meting, sum Almannaverkið ger. Námsfrøðiligt menningararbeiði kemur ikki undir ásetingina, men er bert talan um, at brúkarunum skal verða tryggjað minstu forsvarligu normering við atliti til trygd, lív og heilsu.

Arbeiðssteðgur er verkbann, verkfall, blokada og boykott og skipað avfólkan av einumhvørjum slagi. Orsøkin til ásetingina er, at verkfallið hjá øllum limunum hjá Føroya

Pedagogfelag, sum arbeiða hjá Almannaverkinum, kann hava eina vandamikla støðu við sær fyri nógvar av brúkarunum, sum fáa tænastur frá Almannaverkinum. Harumframt eru partarnir langt frá hvørjum øðrum í samráðingunum at gera nýggjan sáttmála.

Sambært stk. 2 metir Almannaverkið um, hvørji starvsfólk, Almannaverkið ikki kann vera fyriuttan. Viðkomandi limir hjá Føroya Pedagogfelag, sum fáa boð frá Almannaverkinum, hava sostatt skyldu til at fylgja nevndu sáttmálum. Almannaverkið metir, at tørvur í løtuni er dagliga á uml. 139 limum hjá Føroya Pedagogfelag, ið mugu verða undantiknir. Hesin tørvur kann broytast, sum tíðin gongur, tí tørvurin hjá brúkarunum kann broytast, sum dagarnir ganga, eins og nýggir brúkarar kunnu koma inn í skipanina. Tí kann talið broytast, og Almannaverkið hava bráðneyðugan tørv á at fáa fleiri fólk til arbeiðis.

Sambært ásetingini í stk. 3 hava viðkomandi limir hjá Føroya Pedagogfelag, sum fáa boð frá Almannaverkinum, skyldu til at fara til arbeiðis beinanvegin og at fylgja sáttmálum millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, sum vóru galdandi til 1. oktober 2020, fylgiskjal 1 og 2. Hetta merkir, at skuldi Føroya Pedagogfelag lagt málið fyri nevnd eftir § 2, førir tað ikki við sær, at arbeiðsskyldan hjá limunum, sum koma undir hesa áseting, verður útsett. Sáttmálarnir, ið sipað verður til í stk. 3, vóru galdandi millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fyri ávikavist pedagogar og hjálparfólk frá 1. oktober 2017 til 1. oktober 2020, sí fylgiskjal 1 og 2. Lógin er tó ikki galdandi fyri allar limirnar hjá Føroya Pedagogfelag, men bert fyri teir limirnar, ið starvast hjá Almannaverkinum, og hvørs frávera kann seta trygd, heilsu og lív í vanda hjá brúkarunum hjá Almannaverkinum. Tað er Almannaverkið, ið metir um, hvørji starvsfólk, Almannaverkið ikki kann vera fyriuttan. Viðkomandi limir hjá Føroya Pedagogfelag, sum fáa boð frá Almannaverkinum, hava sostatt skyldu til at fylgja nevndu sáttmálum. Í sáttmálaskeiði er friðarskylda. Sostatt stríðir eitt og hvørt stríðsstig, tað er verkbann, verkfall, blokada ella boykott, ímóti lógini, tá ið hon er komin í gildi.

Til § 2

Sambært stk. 1 kann Føroya Pedagogfelag, um felagið ikki er samt við avgerðini hjá Almannaverkinum sbrt. § 1, stk. 2, leggja málið fyri eina nevnd, sum skal taka avgerð um, hvørji starvsfólk hjá Almannaverkinum ella sjálvsognarstovnum undir Almannaverkinum eru undantikin frá møguligum arbeiðssteðgi sambært ásetingum í stk. 5 í avtalu frá 15. januar 2014 um fráboðanarform og fráboðanarfreist millum øðrumegin Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og hinumegin Føroya Pedagogfelag. At málið verður lagt fyri nevndina førir ikki við sær, at skyldan sambært § 1, stk. 3 at fara til arbeiðis verður útsett til nevndin kemur til eina niðurstøðu. Kemur nevndin til eina aðra niðurstøðu enn Almannaverkið, so kann Føroya Pedagogfelag áleggja arbeiðssteðg fyri teir limir, sum eru farnir til arbeiðis eftir § 1, stk. 2 og 3, sum nevndin metir tað ikki vera bráðneyðugur tørvur á at hava til arbeiðis.

Í stk. 2 er ásett, at nevndin verður mannað við 3 limum. Fíggjarmálaráðið velur 1 lim, Føroya Pedagogfelag velur 1 lim, og leiðarin fyri Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu er formaður.

Sambært stk. 3 skal nevndin taka avgerð innan 24 tímar eftir, at áheitan sambært § 1, stk. 4 er komin frá Føroya Pedagogfelag. Verður nevndin ikki samd, tekur leiðarin fyri Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu avgerð.

Í stk. 4 er ásett, at Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag bera útreiðslurnar av samsýning til hvør sín lim í nevndini. Landið ber útreiðslurnar av samsýning til formannin.

Í stk. 5 er ásett, at avgerð sambært stk. 3 ikki kann kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Til § 3
§ 3 er áseting um gildiskomu og sólseturáseting.

Ásett er, at løgtingslógin kemur í gildi, tá ið hon er kunngjørd. Vanligt er, at løgtingslógir koma í gildi dagin eftir, at tær eru kunngjørdar, ella tær koma í gildi ein ávísan dag. At gildiskoman í hesum føri er, tá løgtingslógin verður kunngjørd, skyldast, at málið hevur skund.

Ásett er, at løgtingslógin fer úr gildi, tá ið sáttmálar millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, sum koma í staðin fyri sáttmálarnar, sum vóru galdandi til 1. oktober 2020, eru undirskrivaðir.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 16. juni 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
- Fylgiskjal 1: Sáttmáli fyri pedagogar millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og KAF.
- Fylgiskjal 2: Sáttmáli fyri hjálparfólk millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og KAF.
- Fylgiskjal 3: Avtala frá 15. januar 2014 um fráboðanarform og fráboðanarfreist millum øðrumegin Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og hinumegin Føroya Pedagogfelag.
- Fylgiskjal 4: Lýsing frá Almannaverkinum av avleiðingum av verkfalli, dagfest 14. juni 2021.
- Fylgiskjal 5: Svar frá Føroya Pedagogfelag tann 13. juni 2021 upp á umbøn um undantøk.